# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
13. juni 2023

— Ársfrágreiðing fyri 2022

# 1. Frágreiðing frá nevndini

## Laksaaling

### Framleiðsla og søla 2022

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í 2022 uml. 89 tús. tons í kruvdari vekt, sum er nakað minni enn í 2021, tá ið uml. 95 tús. tons vórðu framleidd. Hóast samlaða nøgdin av laksi minkaði í 2022, øktist útflutningsvirðið av laksavørum í 2022 frá uml. 4,5 mia. kr. í 2021 til uml. 5,5 mia. kr í 2022. Útflutningsvirði er sostatt økt við yvir einari mia. kr. hóast nøgdin av framleiddum laksi minkaði í mun til 2021.

Eftirspurningurin eftir laksavørum hevur seinastu árini verið sera nógv ávirkaður av nógvu tiltøkunum kring heimin at basa koronu-farsóttini, og síðani av russisku innrásini í Ukraina. Serliga fyrst í árinum, eftir at heimsmarknaðurin var komin fyri seg aftur eftir koronu-farsóttina, og matvøru- og tænastuvinnan lat uppaftur, øktist eftirspurningurin og harvið eisini prísurin á laksi nógv. Hetta viðførdi at miðalprísurin av laksi var methøgur í 2022.

Eins og undanfarin ár fór uml. 95% av laksaútflutninginum til teir 5 høvuðsmarknaðirnar ES, Bretland (fyrr eisini ES), USA, Russland og Kina. Her er tó ein stór broyting hend seinasta árið. Eftir russisku innrásina í Ukraina, er føroyski laksaútflutningurin til Russlands heilt steðgaður upp. Stóri eftirspurningurin og avmarkaða útboði av laksi var tó virkandi til at føroyska alivinnan megnaði lutfalsliga væl at finna aðrar keyparar. Í virði var tað serliga ES- og amerikanski marknaðurin sum meir bleiv útflutt til, men eisini til Kina var greið øking í útflutninginum, sum tó framvegis er eitt vet frá teimum 18% sum tann marknaðurin stóð fyri í 2019, áðrenn COVID-19.

### Útlitini fyri laksaútflutningin eru góð fyri 2023

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru tengd at gongdini í útboði og eftirspurningi. Greiningarfyritøkan Kontali metir at samlaða útboðið, sum minkaði í 2022 við umleið 2% sammett við 2021, aftur økist í 2023 við 2–3 %. Við hesum avmarkaða vøkstrinum sum væntast at vera í útboðnum, eru útlit sostatt eisini fyri at høgu prísirnir fara at halda sær komandi árið, tó at ein ikki kann vænta at teir sera høgu prísirnir í fyrra hálvári 2023 fara halda sær í seinna hálvári eisini.

Sum frá líður verður tað tó í stóran mun, hvussu tað eydnast við stóru avbjóðingini kring heimin at minka um trupulleikan við laksalúsini, sum avmarkar vøksturin í útboðnum, og harvið eisini prísin. Eisini kann tað ávirka útboðið í framtíðini, hvussu skjótt tað fer at ganga at menna aðrar alihættir, td. aling á landi, har fiskurin verður aldur á alistøðum á landi heilt fram til tøku.

Tað er umráðandi at minnast til, at føroyskur havbúnaður er í harðari kapping við aðrar alitjóðir, og uppá longri sikt eru útlitini fyri føroyskari aling tí tengd at, hvussu gongdin verður við aling á landi nærri teimum stóru marknaðunum s.s. USA og Kina. Stórar íløgur eru og verða gjørdar í landaling kring heimin í hesum árum, hóast gongdin higartil hevur verið eitt sindur misjøvn. Fæst aling í landanleggum fram til tøku at virka eftir ætlan, kann hetta fáa stóra ávirkan á marknaðin fyri laksavørur.

**Týdningarmikið við tryggum og kappingarførum karmum kring alivinnuna**

Tað hevur alstóran týdning fyri føroyska alivinnu, at karmarnir at arbeiða undir ikki eru verri enn hjá okkara kappingarneytum.

Í 2022 vóru lunnar enn einaferð aftur lagdir undir, at setta í verk nýggja skipan fyri loyvisgjaldi á alifyritøkur. Tó at upprunaliga uppskotið fall burtur, av tí at løgtingsval varð útskrivað í november 2022, tók nýggja samgongan uppskotið fram aftur, við enn hægri loyvisgjalds-stigum.

Havbúnaðarfelagið vísti í allari tilgongdini á, at vinnan ynskir at tøkugjaldið verður roknað av skattskyldugari inntøku, og eina breiða semju millum politisku flokkarnar um skatta- og avgjaldsskipanina fyri alivinnuna, so vinnan kennir fortreytirnar í eina rúma tíð framyvir. Tá íløgur skulu gerast, leggur vinnan íløguætlanir sum strekkja yvir fleiri ár, og verða hesar avgerðir tí tiknar á skeivum grundarlagi.

Við lógaruppskotinum økist samlaði kostprísurin at ala laks í Føroyum langt uppum kostnaðin hjá okkara kappingarneytum, og kann hetta við tíðini føra til, at føroyska alivinnan tapir í kappingini við útheimin. Tað hevur tikið drúgva tíð at byggja góðu kappingarstøðuna, sum føroyska alivinnan hevur, men uttan áhaldandi íløgur og nýskapan í vinnuni er stórur vandi fyri at menningin av føroyskari alivinnu fer at dragna í mun til kappingarneytarnar.

Havbúnaðarfelagið heitir enn einaferð á myndugleikarnar um at hava hetta í huga, tá ið nýggjar lógir og reglur verða smíðaðar, og tá ið almennir eftirlitsmyndugleikar broyta praksis.

**Ov høgt tøkugjald ávirkar møguleikarnar at gera íløgur**

Alivinnan er ein framleiðsluvinna, har tað krevur neyva planlegging og stýring at fáa gott úrslit. Harumframt er alivinnan ein kapitaltung vinna, sum ger stórar íløgur á hvørjum ári. Undir slíkum umstøðum er tað av stórum týdningi, at alifyritøkurnar í góðari tíð kenna fortreytirnar at virka undir.

Føroyska alivinnan hevur lagt seg á odda í heimsins alivinnu. At fasthalda hesa føringina og framhaldandi at vaksa og mennast, krevur enn størri íløgur enn áður. Um tøkugjaldið hækkar ov nógv, er vandi fyri at grundarlagið verður tikið undan kappingaføri og møguleikum fyri framhaldandi vøkstri.

Tað er umráðandi at vísa á, at vøksturin í alivinnuni seinastu árini fyrst og fremst stavar frá, at virksemið á landi er økt munandi við ovurhonds stórum íløgum, sum alivinnan hevur gjørt seinastu árini, og sum eru neyðugar at halda á fram við, fyri at tryggja kappingarførið og grundarlagið undir føroyskari aling. Alivinnan er sera kapitaltung vinna, og tað eru júst íløgurnar seinastu árini, sum hava verið avgerandi fyri stóru framgongdina í føroyskari alivinnu.

**Marknaðaratgongd framvegis ein avbjóðing**

Russiska innrásin í Ukraina og tørvurin á at gera skjótar broytingar í útflutninginum undirstrikar enn einaferð týdningin av, at myndugleikarnir raðfesta arbeiðið at fáa Føroyum betri marknaðaratgongd. Lukkutíð fyri føroyska laksaútflutningin minkaði samlaða útboði av laksi í heiminum í fyrra hálvári 2022. Føroyskir laksaútflytarar høvdu tí góðar møguleikar at fáa selt laksin á øðrum marknaðum. Støðan kundi tó lættliga verið øðrvísi, og tá hevði støðan sannlíkt viðført lækkandi inntøkur fyri føroyska samfelagið.

Fríhandilsavtalur við vakstrarmarknaðir í Asia (serliga Kina og Suðurkorea) hava stóran týdning, meðan tørvur eisini er á veterinerum avtalum við Avstralia og Brasil fyri yvirhøvur at kunna selja føroyskar fiskavørur har. Eisini skal vísast á, at tað í fríhandilsavtaluni við ES er ein lág tollfrí kvota fyri ávísar virkaðar laksavørur, sum kann forða menningini av nýggjum víðarivirkaðum vørum úr laksi. Eisini er ein tollfrí kvota fyri fiskafóður, sum virkar forðandi. Somu forðingar eru víðariførdar í fríhandilsavtaluni við Stórabretland.

Marknaðaratgongdin hjá okkara kappingarneytum er sum heild munandi betri enn hjá føroyskum alifyritøkum, og talið á fríhandilsavtalum er munandi størri hjá øðrum alitjóðum. Sum dømi kann nevnast, at bæði Kili og Ísland hava tollfrælsi fyri sín laksaútflutning til Kina, og Noreg er komið langt í samráðingum um fríhandilsavtalu við Kina. Bæði Noreg og Ísland hava gjøgnum sín limaskap í EFTA atgongd til umleið 30 fríhandilsavtalur, sum fevna um omanfyri 40 lond (ikki íroknað ES). Eisini hava londini fleiri veterinerar avtalur, sum í nøkrum londum er ein fortreyt fyri yvirhøvur at kunna selja fiskavørur har. Føroyar hava hinvegin einans 6 fríhandilsavtalur, íroknað avtaluna við Stórabretland, sum fekk gildi 1. januar 2021.

**Nýggir alihættir krevja dagførdar karmar**

Í Føroyum og fleiri staðni kring heimin verða royndir gjørdar við aling í lokaðum eindum og á opnum havi og øðrum nýskapandi aliháttum. Hóast íløgurnar eru stórar, eru møguleikarnir somuleiðis stórir, um tað fæst at bera til.

Tað hevur týdning, at tað ikki eru óneyðugar forðingar í lóggávuni fyri at alihættir kunnu mennast, og Havbúnaðarfelagið heldur tí, at lóggávan kring alingina í Føroyum eigur at verða dagførd í mun til broyting í alihættunum. Eitt nú er tørvur á at endurskoða, um øll krøvini í verandi rakstrarkunngerð eru viðkomandi, um

alt verður í lokaðum eindum, á streym hørðum sundum, úti á opnum havi, ella ørðum nýskapandi alihættum, soleiðis at karmanir ikki gerast óneyðuga trupulir og harvið tálma menningini av hesum nýskapandi royndum.

### Framleiðslan má vera burðardygg

Matvøruframleiðslan í heiminum er størsta kelda til umhvørvisárin og trýst á mørkini fyri, hvat náttúran megnar. Laksaaling er tó lutfalsliga væl burðardyggari enn flest aðrar protein framleiðslur. Fokus hjá føroyskum havbúnaði eigur áhaldandi at vera, at komandi ættarlið arva eina náttúru, sum er í betri standi, tá ið vit lata hana frá okkum, enn tá ið vit fingu hana at umsita.

Við at seta ein ábyrgdarfullan framferðarhátt í brennidepilin gera vit okkara til at vit í størri mun, røkka fleiri av heimsmálunum hjá ST fyri burðardyggari menning. ST hevur staðfest, at aling av fiskavørum hevur ein stóran leiklut í at nøkta tørvin á hágóðsku proteinum hjá vaksandi fólkatalinum á jørðini. Við at framleiða alilaks við atliti til tey 17 heimsmálini hjá ST, kann føroyskur havbúnaður gera sítt til, at hetta kann eydnast. Eitt nú kann føroyskur havbúnaður verða við til at framleiða matvørur til heimin við lítlari veðurlagsávirkan í mun til flest aðrar animalskar proteinframleiðslur.

Føroyska laksaalivinnan fær sum heild góð skoðsmál frá felagsskapum, sum meta um umhvørvisávirkanina frá ymiskum fiskavørum og geva endabrúkarunum tilmæli um, hvørjar fiskavørur tey skulu eta og úr hvørjum londum. Allar laksaalifyritøkur hava eina ella fleiri sertifiseringar.

### Sama tal á smolti sett á sjógv

Fyritøkurnar nýta framvegis týðandi part av úrslitinum til at gera íløgur í útbygging av smoltstøðum kring landi, nýggj tænastuskip og útgerð til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Íløgur í stórsmolt eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og gera tað møguligt at økja um framleiðsluna við tað, at smoltini eru størri tá tey verða sett út í ringarnar á sjónum.

Í 2022 vórðu uml. 20,6 mió. laksasmolt sett út í Føroyum. Hetta er eitt lítið vet meira enn tað var í 2021, tá ið umleið 20,3 mió. smolt vórðu sett út. Miðal smoltvektin var eitt sindur lægri í 2022 í mun til 2021, sum annars er økt nógv á hvørjum ári síðani 2013, sum so eisini merkir, at hvørt einstakt smolt er styttri tíð á sjónum. Í 2014 var eitt smolt í miðal í sjónum í 18 mánaðir áðrenn tøku, meðan tað í 2022 var á sjónum í knappar 13 mánaðir áðrenn tøku.

Miðal smoltstøddin við útsetu minkaði frá 425 g í 2021 niður í 373 g í 2022. Undantikið 2022, er miðal smoltstøddin seinastu nógvu árini økt sera nógv, og við teimum íløgum sum eru og verða gjørdar í smoltstøðir á landi, væntast miðal smoltstøddin framhaldandi at økjast komandi árini.

**Framvegis fleiri lívfrøðiligir váðar**
Vinnan hevur framvegis ymsar lívfrøðiligar avbjóðingar. Tað hevur høga raðfesting at berjast ímóti lús og sjúkum, so sum hjartasjúkum (serliga CMS), táknusjúkum og sjúkuelvandi ILA.

Feløgini nýta fleiri ymsar hættir at halda lúsatalinum niðri. Umframt at framleiða alsamt størri smolt, sum styttir um tíðina í sjónum, nýta feløgini eisini m.a. rogn-kelsi, feskvatnsviðgerð, mekaniska avlúsing, lokaðar eindir og strategiska plasering av útsetingum. Laksaalarar hava nú í nøkur ár nýtt rognkelsi á flest øllum støðum til tess at fyribyrgja lús í aliringum. Royndirnar higartil vísa, at hetta í flestu førum hevur minkað um tørvin á øðrum viðgerðum. At nýta rognkelsi í sambandi við laksaaling er lutfalsliga nýtt, og avbjóðingarnar við at fáa tey at trívast eru eisini nýggjar og framvegis er langt á mál. At arbeiða miðvíst við at tryggja teirra trivnað er av stórum týdningi.

Framleiðslan av rognkelsum til alivinnuna heldur til í Svínoy. Enn er framleiðslan ov lítil til at nøkta tørvin, og tí er eisini neyðugt at innflyta rognkelsi.

Føroyar hava millum strangastu veterineru standardar í heiminum. Hesir umfata eina røð av krøvum so sum sjúkuviðgerð og fyribyrging, eftirlitið við lús og flutn-ingi. Vit hava eitt vaksandi tal av serútbúnum djóralæknum, lívfrøðingum, umframt hjálparfólkum, sum øll arbeiða fyri betri djóraheilsu og trivnaði.

Føroyska alivinnan hevur síðan 2004 framleitt laks uttan at nýta antibiotika.

**Kópur ein vaksandi trupulleiki fyri alivinnuna.**
Alivinnan hevur tey seinastu umleið tvey árini fingið alsamt størri trupulleikar av kópi, sum er ein vaksandi orsøk til miss av fiski. Hartil kann kópur eisini órógva laksin og gera at hann etur minni og veksur seinni. Tað hevur stóran týdning fyri vinnuna at basa avbjóðingina við kópi.

Á aliráðstevnuni sum Havbúnaðarfelagið skipaði fyri í mars í ár vóru tvey umboð frá alivinnuni úr ørðum londum boðin við til greiða frá vaksandi trupulleikunum sum tey eisini hava av kópi í ørðum londum.

Tað er ikki loyvt at drepa kóp.

**Útbúgving, gransking og menning stóran týdning fyri føroyskan havbúnað**
Føroyskur havbúnaður er ein vitanartung vinna, og framleiðslan gerst alsamt meira samansett og krevjandi. Tað hevur tí týdning, at vit alsamt menna vitanina í og kring alivinnuna gjøgnum útbúgving, gransking og nýmenning.

Havbúnaðarfelagið hevur luttikið aktivt í arbeiðsbólki, sum Yrkisútbúgvingarráðið setti at fyrireika yrkisútbúgving innan aling, og á heysti 2022 byrjaðu loksins fyrstu næmingarnir á alaraútbúgvingini á miðnámi í Vestmanna.

Hóast verandi alarar eru dugnaligir, krevur tað alsamt størri vitan og førleikar at ala á landi og á sjónum. Avbjóðingarnar gerast ikki minni, um farið verður út á meira streymhørð øki ella opið hav at ala. Tørvur er tí á, at tey starvsfólk, sum byrja eina yrkisleið sum alarar, hava eitt gott ástøðiligt og praktiskt grundarlag, tá tey byrja at arbeiða í vinnuni. Samstundis hevur tað eisini týdning at kunna skjalprógvað førleikarnar hjá hesum starvsfólkum. Alifyritøkurnar hava bjóðað seg til at tryggjað eitt ávíst tal av læruplássum tey fyrstu árini, so útbúgvingin kann fáa eina góða byrjan.

Havbúnaðarfelagið hevur eisini í farna ári fíggjað tvær granskingarverkætlanir, sum P/F Fiskaaling fremur. Fyrra verkætlanin snýr seg um at kanna støðuna hjá føroyska sjósílastovninum, og hevur verkætlanin verið í gongd síðani 2018. Seinna verkætlanin fevnir um menning av skipanini LUSIM, sum er eitt planleggingaramboð, ið alifeløgini kunnu brúka í teirra strategiska arbeiðið at basa lús. LUSIM skipanin er ein yvirbygnaður av Salmon lice simulatorinum.

**Taraaling**
Tilsamans uml. 175 tons av tara í vátari vekt vórðu heystað og seld í 2022. Tað er eitt vet lægri enn í 2021, tá uml. 185 tons í vátari vekt vórðu heystað. Talan er um ymisk sløg av tara. Væntandi økist framleiðslan nógv komandi árini.

Tað mesta verður útflutt til ES-lond, til matvøruframleiðslu (granulat og liðugvøru) og til ískoytisfóður.

Eisini verður tari aldur til náttúrlig taraskjól til rognkelsi, at nýta í laksaalingini.

# Innihaldsyvirlit


1. **Frágreiðing frá nevndini** ........ 2
2. **Endamál Havbúnaðarfelagsins** ........ 9
3. **Gongdin í føroyskum havbúnaði** ........ 10

3.1 Framleiðsla ........ 10

3.2 Útseting av smolti ........ 12

3.3 Útflutningur ........ 13

3.4 Prísir ........ 13

3.5 Býtið av útflutningi ........ 16

3.6 Marknaðir ........ 17

3.7 Vørusløg ........ 18

4. **Mál felagið hevur arbeitt við í árinum** ........ 19

4.1 Aliráðstevnan ........ 19

4.2 Verkætlan at lýsa støðuna hjá sjósílastovninum ........ 19

4.3 Verkætlan at menna lúsaforsagnarforrit - LUSIM ........ 19

4.4 Útbúgving av starvsfólki til alivinnuna ........ 19

4.6 Brexit ........ 20

4.7 Altjóða samstarv ........ 21

4.8 Salmon from the Faroes ........ 21

5. **Lógir og kunngerðir** ........ 22

5.1 Broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu ........ 22

## 2. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá føroyskum havbúnaði – bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av føroyskum havbúnaði.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

**Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:**
Regin Jacobsen, Bakkafrost
Atli Gregersen, Luna/Hiddenfjord
Hans Jákup Mikkelsen, MOWI Føroyar

# 3. Gongdin í føroyskum havbúnaði

## 3.1 Framleiðsla

**Laksur**

Tøkan av laksi í 2022 var uml. 108 tús. tons í livandi vekt. Hetta er nakað minni enn metárið í 2021 tá tøkan var uml. 115 tús. tons. Tøkan í 2022 svarar til uml. 89 tús. tons  í kruvdari vekt. Á mynd 1 sæst annars, at framleiðslan í alivinnuni fyrstu árini aftaná kreppuárini øktist munandi, og síðani hevur árliga framleiðslan verið meira støðug fram til 2021, tá framleiðslan aftur vaks í stórum. Hóast framleiðslan ikki var eins stór sum í 2021, var framleiðsan í 2022 munandi størri enn árini fyri 2021. Stóru íløgurnar í smoltstøðirnar á landi seinastu árini hava økt um smoltstøddina, og harvið stytt um miðal framleiðslutíðina á sjónum. Við einari styttri framleiðslutíð á sjónum ber so eisini til at framleiða størri nøgdir av laksi tilsamans. Hetta er ein av høvuðsgrundunum fyri at framleiðsan er økt seinastu árini.

Eins og undanfarin ár vórðu eingi síl tikin í 2022, og nú eru seinastu føroysku sílini tikin av.

MYND 1




| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 | 80,629 | 85,825 | 86,830 | 78,975 | 94,993 | 88,960 | 115,683 | 108,679 |

*Mynd 1 - Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2007–2021 Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik*

Mynd 2 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku í 2022. Her sæst, hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Seinastu árini hevur nakað meira verið tikið út á heystið, men sum heild er tøkan býtt nokk so javnt út á árið. Tó verður minni tikið á hásumri og um ársskiftið.

Vikuliga tøkan av alifiski verður løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

**MYND 2**
**Ár 2022**




**Vikunummar**

Mynd 2. Tøka av alifiski (tons kruvd vekt) viku fyri viku í 2022
Kelda: Havbúnaðarfelagið

## Tari

Taraaling er framvegis í menning í Føroyum, tó at føroyska taraalingin er framma-liga í altjóða høpi. Í løtuni eru tvey føroysk taraalifeløg.

Umleið 175 tons av tara í vátari vekt vórðu heystað og seld tilsamans í Føroyum í 2022. Hetta er eitt lítið vet lægri enn í 2021, tá uml 185 tons í vátari vekt vórðu heystað. Tað mesta varð útflutt til ES-lond, Noreg og Bretland, til matvøruframleiðslu (ingrediens- og liðugvøra) og til fóður. Eisini verður tari aldur til náttúrlig taraskjól til rognkelsi, at nýta í laksaalingini.

Tað eru í dag fýra aliloyvi útskrivaði til aling av tara. Á Funningsfirði (út fyri Elduvík), á Gøtuvík og á Kaldbaksfirði, umframt loyvi til lívtaraaling í Fámjin. Væntað verður, at framleiðslan økist munandi í 2023 í mun til 2022.

Tað er tó alneyðugt fyri vinnuna, at fáa atgongd til vistfrøðiligu sertifiseringina, sum verður nýtt í ES, soleiðis at møguleiki verður fyri at taraframleiðslan kann seljast til teir best gjaldandi altjóða marknaðirnar. Myndugleikarnir hava arbeitt eina tíð við hesum málinum, men enn er ikki komið á mál.

### 3.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útseting av laksi og sílum síðani aldarskiftið. Myndin vísir, at tað seinnu árini hevur verið støðugur ein vøkstur í talinum av útsettum smolti, og gongdin helt fram í 2022. Útsetingin í 2022 var umleið 20,6 mió. smolt, sum er umleið 300 tús. hægri enn tað var í 2021. Hartil skal eisini havast í huga, at miðal smoltvektin er økt munandi seinastu árini, sum eisini merkir, at hvørt einstakt smolt er styttri tíð á sjónum. Í 2014 var eitt smolt í miðal í sjónum í 18 mánaðir áðrenn tøku, meðan tað í 2022 var á sjónum í miðal 13 mánaðir áðrenn tøku.

Miðal smoltstøddin við útsetu minkaði frá 425 g í 2021 niður í 373 g í 2022. Undantikið 2022, er miðal smoltstøddin seinastu nógvu árini økt sera nógv, og við teimum íløgum sum eru og verða gjørdar í smoltstøðir á landi, væntast at miðal smoltstøddin framhaldandi at økjast komandi árini.

**MYND 3**

**Smolt sett á sjógv**




Mynd 3. Útseting av smolti frá 2001 til 2022

Kelda: Rúni Dam, Sp/f Avrik

## 3.3 Útflutningur

Útflutningsvirðið av alilaksi var í 2022 uml. 5,5 mia. kr., sum er ein øking á meira enn ein milliard í mun til undanfarna ár tá útflutningsvirði var knappar 4,5 mia. kr. Harvið er útflutningsvirði av alilaksi økt við yvir tveimum mia. seinastu tvey árini, tó at viðmerkjast skal, at marknaðarstøðan var munandi truplari í 2020 orsaka av COVID-19 farsóttini.

Eftirspurningurin eftir laksavørum hevur seinastu árini verið sera nógv ávirkaður av nógvu tiltøkunum kring heimin at basa Koronu farsóttini, og síðani av russisku innrásini í Ukraina. Serliga fyrst í árinum, eftir at heimsmarknaðurin kom fyri seg aftur eftir koronu-farsóttini, og matvøru- og tænastuvinnan lat uppaftur, vaks eftirspurningurin og prísurin á laksi nógv.

Tá ið tað snýr seg um útflutning av alifiski, eru seinnu árini í roynd og veru einans talan um útflutning av laksi. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøran hjá Føroyum og stendur fyri uml. 48% av samlaða virðinum av føroyska fiskavøruútflutninginum.

MYND 4




| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Laksur | 1.822. | 2.456. | 2.950. | 2.804. | 3.661. | 3.867. | 3.340. | 4.041. | 3.312. | 4.489. | 5.552. |

Mynd 4. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2012 til 2022 (1000 kr.)
Kelda: Hagstova Føroya

## 3.4 Prísir

Marknaðarprísurin á laksi var methøgur í 2022. Marknaðarprísurin á laksi var bæði í 2020 og 2021 sera nógv ávirkaður av COVID-19 støðuni kring heimin. Hetta viðførdi at miðalprísurin á heilum, feskum føroyskum laksi hesi árini var 46–47 DKK/kg, sum var væl lægri enn árini frammanundan. Eftirspurningurin frá matstovum, gistingarhúsum og catering (horeca), minkaði í stórum tá COVID-19 farsóttin herjaði kring heimin, men í staðin øktist eftirspurningurin frá retail-segmentinum, sum í størri mun eftirspyr virkaðar vørur, sum eitt nú portiónir og flak. Serliga fyrra hálvár í 2022 tá bæði matstovuvinnan kom upp í ferð aftur, og

minking í samlaðu veitingini av laksi førdu til munandi hækkandi laksaprísir, sum eisini var tann hægsti nakrantíð á várið í 2022. Gjøgnum árið sveiggjaði prísurin á laksi nógv, men var tó yvirskipað høgur, og miðalprísurin fyri alt árið var 66 DKK/kg. sum er munandi hægri enn árini frammanundan – eisini aðrenn COVID-19 farsóttina.

MYND 5




Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi (ársins prísir). FOB Føroyar
Kelda: Hagstova Føroya

Um sæð verður burtur frá árunum 2020–2021, tá ið serligar umstøður vóru, hevur prísurin seinnu árini hildið sær omanfyri 50 DKK/kg. og í 2022 rakk miðalprísurin á feskum føroysum laksi heilar 66 DKK/kg. Eisini prísurin á øðrum vørum s.s. portiónum hevur hildið sær væl, og tilsamans hevur hetta verið grundarlagið undir góðu gongdini í alivinnuni. Vanliga má roknast við, at ein hækkandi vinningur eisini førir til, at fleiri fyritøkur koma inn á marknaðin, og dríva prísin niður móti framleiðslukostnaðinum. Tað hevur tó víst seg at vera torført at vaksa um framleiðsluna líka skjótt sum eftirspurningurin økist. Orsøkin hevur serliga verið, at ikki nóg nógv nýggj aliøki eru tøk kring heimin, og at laksalúsin hevur gjørt tað torført at vaksa munandi um framleiðsluna á verandi aliøkjum.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru tengd at gongdini í útboði og eftirspurningi. Samlaða útboðið minkaði í 2022 við umleið 2% sammett við 2021, og fyri árið 2023 væntast vøksturin á heimsútboðnum av laksi at økjast aftur við millum 2–3 %. Við avmarkaða vøkstrinum sum væntast at vera í útboðnum í 2023, eru útlit sostatt eisini fyri at høgu prísirnir fara at halda sær komandi ári, tó at ein ikki kann vænta at teir sera høgu prísirnar í fyrra hálvári 2023 fara halda sær í seinna hálvári eisini.

Sum frá líður verður tað í stóran mun, hvussu tað eydnast at minka um trupulleikan við laksalúsini, sum hevur verið ein avbjóðing um allan heim, sum avmarkar vøksturin í útboðnum, og harvið eisini prísin. Eisini kann tað ávirka útboðið í framtíðini, hvussu skjótt tað fer at ganga at menna aling á landi, har fiskurin verður aldur á alistøðum á landi heilt fram til tøku.

Miðalprísurin fyri frystar laksaportiónir var í 2022 uml. 106 DKK/kg, sum er áleið 15 DKK/kg hægri enn í 2021. Prísurin hevur yvirskipað verið støðugur seinastu árini á frýstum laksaportiónum - eisini undir støðuni við COVID-19. Prísurin á laksaportiónum verður í stóran mun ásettur í langtíðarsáttmálum, og tískil er prísurin sum heild meira støðugur enn á øðrum laksavørum, tó at lækkaði laksaprísurin orsakað av COVID-19 tiltøkunum eisini sæst aftur í prísinum á portiónum.

**MYND 6**
**Laksaportiónir**




| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| DKK/kg | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,63 | 83,52 | 95,74 | 100,91 | 95,74 | 94,14 | 90,91 | 105,81 |

Mynd 6. Miðalprísur pr. kg av frystum laksaflaki (laksaportiónum) 2012–2022.
Kelda: Hagstova Føroya

### 3.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2012 til 2022. Nógv tann størsti parturin av útflutninginum er framvegis heilur feskur laksur, sum í 2022 hevði eitt útflutningsvirði á uml. 3,5 mia. kr., sum er 500 mio. hægri enn í 2021. Á mynd 8 sæst tó, at lutfallið av heilum feskum laksi minkaði eitt vet í mun til 2021, og stóð fyri 64% av útflutningsvirðinum, í mun til 68% í 2021.

Útflutningur av frystum flaki øktist eisini nógv í 2022, bæði í virði og býti. Sostatt var samlaði útflutningurin av frystum flaki næstan 1,4 mia. í 2022. Ein øking á knappar 500 mio. kr. í mun til 2021, og ein øking frá 20% til 25% av samlaða útflutningspartinum av útflutningsvirðinum. (sí. Mynd 8)

Størsta lutfalsliga broytingin í útflutninginum seinastu árini er tó at finna í bólkinum ”laksur, annað”. Hetta er í stóran mun kølt flak, og er virði fleirfalda seinastu fáu árini. Lutfallið er fari frá 3% av útflutningsvirðinum í 2019 til heili 11% í 2022, sum var knappar 600 mio. kr.

MYND 7




Mynd 7. Býtið av útflutningi av laksavørum 2012–2022
Kelda: Hagstova Føroya

MYND 8




Mynd 8. Býtið av útflutningi av laksavørum í % 2012–2022
Kelda: Hagstova Føroya

## 3.6 Marknaðir

Seinastu fimtan árini er hend ein globalisering av føroyskum laksaútflutningi (mynd 9). Frá at hava útflutt á leið 50% til ES-marknaðin í árunum 2007 til 2010, umframt áleið 20% til Bretland (tá eisini ES), minkaði tann lutfalsligi parturin av útflutninginum til ES heilt niður í 27% (ávíkavist 19% og 8%) í 2018. Seinastu fimm árini er útflutnignurin til ES marknaðurin aftur vaksin sera nógv. Serliga síðani 2020, orsakað av COVID-19 sum gjørdi tað torført at útflyta til fjarskotnar marknaðir sum USA og Kina, og síðani í 2022 tá Rusland gjørdi innrás í Ukraina, sum hevur viðført at útflutingurin av laksi til Ruslands er heilt steðgaður.

Umframt ES hava tað seinnu árini serliga verið Bretland (eftir Brexit), USA, EABS (Russland) og Kina, sum hava keypt føroyskan laks. Tilsamans fer uml. 95% av laksaútflutninginum til hesar fimm marknaðirnar.

Útflutningurin til Kina er munandi øktur seinnu árini, men útflutningsparturin kavaði aftur í 2020, orsakað av COVID-19 støðuni. Í virði er útflutingurin til Kina vaksin aftur í 2022 men er framvegis langt frá teimum 18% sum marknaðurin í Kina var áðrenn Korona-farsóttin byrjaði. Útflutningsparturin til USA minkaði eisini tá Korona-farsóttin byrjaði í 2020, men er nú komin væl fyri seg, og stóð USA fyri 28% av útflutningsvirðinum í 2022. Útflutningur til Russlans sum í árunum frá 2014 og fram til 2021 var á leið 20%-30% av samlaða laksaútflutninginum var einans 1,9% í 2022.

Útboðið av laksi í heiminum minkaði við 2,1% 2022, og hetta hevur uttan iva gjørt tað lættari at finna nýggjar keyparar og marknaðir hjá føroysku alivinnuni, nú føroyski laksaútflutningurin til Russland í 2022 er heilt uppsteðgaður.

MYND 9
Útflutningsvirðið (%) á laksi 2007–2022




Mynd 9. Býtið av laksaútflutningi á høvuðsmarknaðirnar 2007–2022
Kelda: Hagstova Føroya.

## 3.7 Vørusløg

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Tølini eru fyri seinastu tíggju árini.

TALVA 1

| 1.000 kr. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 1.720.921 | 1.971.084 | 1.955.213 | 2.741.263 | 2.781.094 | 2.831.989 | 3.079.375 | 2.025.914 | 3.043.807 | 3.543.112 |
| Frystur laksur | 45.235 | 23.257 | 34.902 | 8.390 | 30.731 | 18.798 | 24.448 | 21.859 | 75.950 | 51.822 |
| Laksaportiónir | 618.848 | 852.652 | 693.524 | 777.419 | 916.661 | 384.081 | 815.440 | 1.083.774 | 904.586 | 1.362.733 |
| Roykt laksaflak | 0 | 0 | 0 | 424 | 962 | 2.711 | 1.937 | 2.706 | 791 | 3.439 |
| Laksur, annað | 71.406 | 103.545 | 120.930 | 134.209 | 138.208 | 104.430 | 120.316 | 178.130 | 464.323 | 591.304 |
| **Tilsamans** | **2.456.409** | **2.950.538** | **2.804.570** | **3.661.704** | **3.867.656** | **3.342.009** | **4.041.516** | **3.312.382** | **4.489.457** | **5.552.409** |

Talva 1. Útflutningsvirðið fyri ymsu vørubólkarnar frá 2013 til 2022, tús. kr. *
Kelda: Hagstova Føroya

TALVA 2

| tons | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur Laksur | 42.312 | 47.588 | 45.454 | 49.854 | 50.340 | 53.562 | 58.461 | 44.316 | 64.490 | 53.745 |
| Frystur laksur | 1.204 | 611 | 983 | 194 | 560 | 376 | 515 | 450 | 1.704 | 1.942 |
| Laksaportiónir | 9.473 | 10.775 | 8.601 | 9.308 | 9.574 | 3.806 | 8.517 | 11.513 | 9.950 | 12.880 |
| Roykt laksaflak | 0 | 0 | 0 | 4 | 9 | 123 | 19 | 23 | 7 | 71 |
| Laksur, annað | 5.922 | 7.918 | 7.189 | 1.918 | 1.827 | 1.454 | 1.689 | 2.986 | 6.932 | 6.320 |
| **Tilsamans** | **58.911** | **66.891** | **62.228** | **61.277** | **62.310** | **59.321** | **69.201** | **59.288** | **83.082** | **74.958** |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2012 til 2021, tons *
Kelda: Hagstova Føroya

TALVA 3

| Kr/kg | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur Laksur | 40,67 | 41,42 | 43,02 | 54,99 | 55,25 | 52,87 | 52,67 | 45,72 | 47,20 | 65,92 |
| Frystur laksur | 37,56 | 38,07 | 35,50 | 43,18 | 54,89 | 49,97 | 47,43 | 48,63 | 44,57 | 26,69 |
| Laksaportiónir | 65,33 | 79,13 | 80,63 | 83,52 | 95,75 | 100,91 | 95,74 | 94,14 | 90,91 | 105,81 |
| Roykt laksaflak | N/A | N/A | N/A | 117,81 | 106,89 | 22,01** | 102,49 | 115,63 | 121,69 | 48,37 |
| Laksur, annað | 12,06 | 13,08 | 16,82 | 69,98 | 75,64 | 71,85 | 71,24 | 59,65 | 66,98 | 93,56 |
| **Tilsamans** | **41,70** | **44,11** | **45,07** | **59,76** | **62,07** | **56,34** | **58,40** | **55,87** | **54,04** | **74,07** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2012 til 2022, kr/kg.*
Kelda: Hagstova Føroya

* Orsakað av einari broyting í uppgerðarháttinum, kunnu tølini áðrenn 2016 ikki uttan víðari sammetast við tølini í 2016 og seinni.

** Feilur er í skrásetingunum hjá TAKS/Hagstovuni av royktum laksaflaki.

# 4. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

Her er ein stutt frágreiðing um nøkur mál, ið nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

### 4.1 Aliráðstevnan

Havbúnaðarfelagið skipar á hvørjum ári fyri aliráðstevnu, sum tey seinastu árini hevur verið hildin á Hotel Føroyum. Ráðstevnan er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við Aliráðstevnuni er at førleikamenna starvsfólkið innan havbúnaðin, og at geva starvsfólkunum og fólki við áhuga í havbúnaði møguleika at hittast og netverka.

Aliráðstevnan var aftur í ár sera væl vitjað við fleiri enn fýra hundrað gestum. Miðað verður eftir at hava eina fjølbroytta skrá, so allir luttakararnir kunnu fáa okkurt burturúr teimum fyrilestrum, ið verða hildnir.

Framløgurnar frá Aliráðstevnunum farnu árini eru at finna á heimasíðuni hjá Vinnu-húsinum www.industry.fo.

Aliráðstevnan 2024 verður eftir ætlan 1. mars 2024.

### 4.2 Verkætlan at lýsa støðuna hjá sjósílastovninum

Havbúnaðarfelagið tók í 2018 stig til eina verkætlan, sum hevur til endamáls at lýsa støðuna hjá føroyska sjósílastovninum. Avtala er gjørd við P/F Fiskaaling um at útinna verkætlanina, og fevnir arbeiðið m.a. um at skráseta og kanna smoltið, sum fer á sjógv, og at kanna støðuna hjá vaksnum sjósílum á sjónum. Støða verður á hvørjum ári tikið til framhald av verkætlanini. Avtala er gjørd um at halda á fram við sjósílaverkætlanini í 2023, tó at ávísar tillagingar vera í gjørdar. Sostat er avgjørt at PIT-merkja sílini, fyri at fáa enn betur upplýsingar um, í hvønn mun sílini verða ávirkaði av laksalús. Hetta er verður royndarkoyrt í 2023 og so verður aftur støða tikin til, um nýggi leisturin skal halda fram í 2024.

### 4.3 Verkætlan at menna lúsaforsagnarforrit - LUSIM

Verkætlanin fevnir um menning av skipanini LUSIM, sum er eitt planleggingaramboð, ið alifeløgini kunnu brúka í teirra strategiska arbeiðið at basa lús. LUSIM skipanin er ein yvirbygnaður av Salmon lice simulatorinum.

Tá verkætlanin er liðug, skal LUSIM vera klárt at nýta sum eitt brúkaravinarligt og álítandi planleggingaramboð fyri lúsastrategiina á øllum føroysku aliøkjunum. Verkætlanin byrjaði í juni 2022, og væntast at enda í oktober 2023.

### 4.4 Útbúgving av starvsfólki til alivinnuna

Havbúnaðarfelagið hevur heitt á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta á stovn eina yrkisútbúgving innan aling, og hevur Yrkisútbúgvingarráðið tikið væl ímóti áheitanini. Yrkisútbúgvingarráðið setti ein arbeiðsbólk at fyrireika útbúgvingina, Havbúnaðarfelagið luttók aktivt í arbeiðsbólkinum, saman við umboðum frá alifeløgunum og frá Yrkisdeplinum, sum hevði verkætlanarleiðsluna.

Løgtingið játtaði fígging til útbúgvingina, sum byrjaði á heysti 2022 á miðnámi í Vestmanna. Ætlanin er at taka ein flokk inn um árið, og alifeløgini hava tryggjað lærupláss til lærlingarnar fyrstu tíðina, so útbúgvingin kann fáa eina góða byrjan.

Útbúgvingin fer partvíst fram á miðnámi í Vestmanna og partvíst úti á læruplássinum hjá alifeløgunum.

### 4.5 Endurskoðan av umhvørvisgóðkenningum og vegleiðing

Umhvørvisstovan hevur tikið stig til at endurskoða vegleiðingina um umhvørviseftirlit við alivirksemi á sjónum, og hevur síðani á vári 2022 sett ein arbeiðsbólk við umboðum frá Umhvørvisstovuni, Fiskaaling, Biofar, Havbúnaðarfelagnum og einstøku alifeløgunum at endurskoða vegleiðingina.

### 4.6 Brexit

Brexit hevur haft og fer eisini frameftir at hava neiligar avleiðingar fyri føroyskan inn- og útflutning, hóast vit hava eina fríhandilsavtalu við Stóra Bretland, sum er meinlík avtaluni vit hava við ES. Sum dømi kann nevnast lágu tollfríu kvoturnar fyri útflutning av føroyskum laksafóðri til Stóra Bretlands, og at tað hevur verið trupult at útflutt fiskavørur umvegis Stóra Bretland, eitt nú til Írlands og Fraklands, og mannagongdirnar hava verið ógreiðar.

Havbúnaðarfelagið hevur haft dialog við myndugleikar í Føroyum og Stóra Bretlandi um teir trupulleikar, sum hava verið.

Bretska stjórnin ætlaði at tað í seinnu hálvu av 2022 skuldi koma í gildi krav um heilsuváttan fyri fiskavørur, sum verða útfluttar til Stóra Bretlands, og um at allar fiskavørur skuldu fara um eina BIP-støð í Stóra Bretlandi, tá tær koma til landið. Hesar ætlanir eru fyribils útsettar, meðan arbeitt verður við at snikka eina smidligari skipan í verk. Eftir ætlan verða krøvini í samband við heilsuváttanir settar í gildið 31. oktober 2023, og harafturat verður marknaðareftirlitið her í 2024.

### 4.7 Altjóða samstarv

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association). Fastir fundir eru hálvárliga, og luttekur Havbúnaðarfelagið á hesum fundum, í tann mun tað er praktiskt møguligt. Harumframt eru online fundir eftir tørvi.

### 4.8 Salmon from the Faroes

Felagið eigur og rekur heimasíðuna Salmon from the Faroe Islands (www.salmon.fo). Tað koma javnan fyrispurningar um føroyskan havbúnað gjøgnum hesa síðuna, bæði frá keyparum og frá endabrúkarum. Fyrispurningarnir kunnu í stórum býtast í tvey: Fyrispurningar um keyp av føroyskum laksi og fyrispurningar um, hvussu framleiðslan er skipað. Undir hesum síðsta eru eitt nú fyrispurningar um fóður, heilivágsnýtslu, ymisk úrslit frá yvirvøkuskipanum o.s.fr. Í hesum sambandi er tað ein stórur fyrimunur fyri føroyskan havbúnað at kunna vísa á, at einki antibiotika verður nýtt, og at fóðrið er non-GMO.

Farið er undir at dagføra hesa heimasíðuna.

# 5. Lógir og kunngerðir

Seinasta árið er tað serliga uppskotið um loyvisgjald sum hevur fylt nógv, og er av alstórum týdningi fyri Havbúnaðarfelagið.

## 5.1 Broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu

Uppskot um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu varð sent til ummælis hjá Havbúnaðarfelagnum í mai 2021. Havbúnaðarfelagið gjørdi felags hoyringarsvar til uppskotið, sum tó fall burtur, av tí at løgtingsval varð útskrivað í november 2022, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Nýggja samgongan tók tó uppskotið fram aftur, men við enn hægri loyvisgjalds-stigum umframt aðrar smávegis broytingar. Havbúnarfelagið gjørdi aftur hoyringarsvar til uppskotið, har felagið millum annað vísti á týdningin av at politisku flokkarnar finna eina breiða semju um skatta- og avgjaldsskipanina fyri alivinnuna, so vinnan kennir fortreytirnar at virka undir í eina rúma tíð framyvir. Eisini varð víst á, at um føroysk alivinna í framtíðini eisini skal vera kappingarfør, og ikki skal dragna í mun til kappingarneytar kring heimin, er tað er fortreyt at vinnan áhaldandi ger stórar íløgur í bæði viðlíkahald, menning og nýhugsan. Við ov høgum tøkugjaldi, er vandi fyri at grundarlagið verður tikið undan kappingaføri og møguleikum fyri framhaldandi íløgum og vøkstri.

Broytingaruppskotið bleiv samtykt 17. Mai 2023.